# Tøkk



Vit takka hjartaliga fyri sýnda samkenslu tá okkara elskaði sonur og beiggi

**Hjarnar Johannesen**
Vestmanna

brádliga andaðist og bleiv jarðaður.

Tøkk til tykkum, sum komu til hjálpar á vanlukkustaðnum, og til starvsfólkini á G1 sum tóku sær so væl av okkum.
Tøkk til Berg Debes Joensen og Ingu Dam fyri góð og troystarrík orð í kapellinum, heima og í kirkjuni.
Tøkk til Vestmanna kirkjukór, Bjørg Olsen, Martin Joensen og Paula Magnussen fyri vakran sang í kirkjuni, og Anette, Raymund og Daniel fyri vakrar tónar, og til Vestmanna Hornorkestur fyri at tit spældu so vakurt uttan fyri heimið hjá okkum.
Tøkk til kirkjutænarar, sangarar, berarar, gravarar og bilførara, og tykkum mongu sum fylgdu Hjarnar til hansara seinasta hvíldarstað.
Tøkk til bindiklubban, starvsfólkini í barnagarðinum og útibarnagarðinum fyri at tit skipaðu so væl fyri ervinum, og øll tykkum sum hjálptu so væl til.
Tøkk til børnini í Kelduni fyri tekingar og hjørtu, og øll tit sum teknaðu og skrivaðu tykkara seinastu heilsan til Hjarnar.
Tøkk til floksfelagaðar og vinir hjá Róki fyri góða hjálp og umsorgan.
Tøkk til lærarar,heilsusystir,foreldur og næmingar í 3.og 9. flokki fyri vitjan heima og at tit skipaðu so væl fyri í skúlanum.
Ein serstøk tøkk til familju, vinir, kenningar og grannar sum vóru og eru um okkum, og sum tóku so væl ímóti okkum tá vit komu heim við Hjarnar.
Tøkk fyri vitjanir, heilsanir, brøv, uppringingar, blómur, kransar og peningagávur til "BERIN", og øll tykkum sum bakaðu.
Tøkk øll somul fyri tykkara umsorgan og kærleika í hesi sváru tíð.
Guð signi tykkum øll, og gleðiligar páskir.

*Heilsan*
**Kirstin, Sofus, Rókur og Ronja**

# Tøkk

Fyri sýnda samkenslu við deyða og jarðarferð hjá bróður mínum

**Ludvík Kjelnæs**
Klaksvík

takki eg hjartaliga.

Tøkk øll tit, ið ringdu og vitjaðu inn á gólvið. Tit, ið sendu blómur, og tit, ið sendu gávur til Kristnastovu - og til øll, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað her á fold, sendi eg mína hjartans tøkk.

Gleðiligar páskir.

**Magnus Kjelnæs, Klaksvík**

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu, tá okkara kæra móðir, vermóðir, omma og langomma

**Óluva Samuelsen**
Klaksvík

andaðist og varð jarðað.

Tøkk til prest, kirkjutænarar og sangarar.
Tøkk til tykkum, ið hjálptu við ervinum og tykkum, ið komu við køkum.
Tøkk til deild M á Klaksvíkar sjúkrahúsi.
Tøkk fyri blómur og kransar.
Tøkk fyri peningagávu til MSF-felagið.
Tøkk til tykkum mongu, ið fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Vegna tey avvarðandi*
**Páll, Símin**
**Oddvør, Kristianna og Jóna við familjum**

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum sýndu hjálpsemi og samkenslu, tá ið kæra mamma, vermamma, omma, langomma og olduromma okkara

**Sigrid Eysturdal**

doyði og varð jarðað.

Tøkk til kirkjutænarar og Niels Paula Danielsen prest fyri góð orð.
Tøkk til sangararnar.
Stóra tøkk til heimahjálparar og heimasjúkrasystrar fyri ta góðu hjálp og umsorgan, tit vístu henni.
Tøkk fyri blómur, kransar og gávur og tøkk til tykkum, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

Hjartans tøkk øll somul.

*Fyri tey avvarðandi*
**Sigrid og Sigmar**

# Føðingar

30. mars fingu Daysie og Róðin Thomsen, Fuglafjørður, eina dóttur. Hon var 42 cm. long og vigaði 1630 gr.

30. mars fingu Rannvá og Rúni Justinussen, Norðragøta, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3550 gr.

31. mars fingu Ruth E. Jacobsen og Jói Winther, Hoyvík, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3210 gr.

31. mars fingu Heidi og Karl Vang, Toftir, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 2900 gr.

31. mars fingu Bjørg og Terji Nielsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3750 gr.

1. apríl fingu Hansy og Ronni Svalbard, Toftir, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 4235 gr.

1. apríl fingu Sára Thomsen, Argir og Sveinur Gullfoss, Hoyvík, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 3600 gr.



*Madison Marie hevur 3. mars 2007 fingið ein lítlan fittan beiggja, ið hevur fingið navnið Matanofo Jonah Paulo Sakalia-Andreasen. Foreldur eru Rita Sakalia (frá Tokelau) og Andreas Andreasen (úr Tórshavn), tey eru øll búsitandi í New Zealandi. Matanofo vigaði 3.9 kg. Muss og klemm til familjuna í NZ.*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Regin Dahl** andaðist í Keypmannahavn 29. mars, 88 ára gamal. Kórseting verður í Vartov kirkju í Keypmannahavn týsdagin 10. apríl klokkan 11.

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at okkara elskaði pápi, verpápi, abbi og langabbi

**Poul Poulsen, (Pollaba)**

andaðist á Norðoya Røktarheimi 31. mars, 90 ára gamal.

Kistan fer úr kapellinum á Klaksvíkar Sjúkrahúsi týsdagin 3. apríl kl. 18.
Jarðarferðin verður úr Betesda mikudagin 4. apríl kl. 14.

*Familjunnar vegna*
**Páll, Elsa, Frida og Malena**

*Tey, ið vilja minnast pápa, kunnu lata eina gávu til Akurin.*